ítróttur

Nr. 54 • hósdagur • 16. mars 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Nicoleta gjørdi av við Kyndil

**Finaludreymurin hjá Kyndli var til staðar í hálvleikinum í dystinum ímóti Neistanum, men í seinna hálvleiki rann Neistin frá Kyndli. Nicoleta Radu Hansen skoraði 11 av teimum 19 málunum, sum Neistin fekk í seinna hálvleiki**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Eftir eitt tap á fýra mál hevði Kyndil framvegis eina lítla vón um, at liðið kundi røkka finaluni í Sunset-kappingini, og tá ið seinna hálvfinalan ímóti Neistanum í gjárkvøldið var hálvspæld, var vónin framvegis til staðar.

Neistin og Kyndil gjørdu ikki nógv um seg í fyrra hálvleiki, tí støðan í hálvleikunum var 6-6.

Í seinna hálvleiki kom Neistin rættiliga fyri seg, og so kundi Kyndil ikki standa ímóti tí bláa havnaliðnum. Serliga Nicoleta Radu Hansen gekk undan hjá Neistakvinnum, og hon skoraði 11 av sínum 13 málinum í seinna hálvleiki. Stórskjúttin hjá Neistanum gjørdi meira enn helmingin av málunum hjá liðnum.

### Góð byrjan

Kyndil byrjaði dystin væl og legði seg fram um 5-3. Næstu løtuna fekk liðið tvey brotskøst, men misnýtti bæði. Fyrst var tað Randi Wardum og síðani Jórun Ludvig, sum ikki fingu bóltin í málið.

Eftir hetta fótaði Neistin sær, vann seg upp á javnleik, og so var eingin vegur aftur. Eftir 10 minuttir av seinna hálvleiki var Neistin komin upp á 12-8, og munurin vaks restina av dystinum.

Neistin er tí til reiðar til finaluna í Sunset-kappingini, sum verður ímóti Stjørnuni, ið vann á VB í sínari hálvfinalu.



*Nicoleta Radu Hansen bumbaði Kyndil í sor í seinna hálvleiki, og Neistin er til reiðar til finaluna um FM í kvinnuhondbólti. Mynd: Álvur Haraldsen*

**FAKTA**

Seinna hálvfinala í Sunset-kappingini
Kyndil-Neistin 18-25 (6-6)
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Randi Wardum 6, Anja Heinadóttir 5, Lina Adrilyde, Jórun Ludvig 2, Súsanna Petersen 1
**Neistin:** Nicoletta Radu Hansen 13, Ása á Neystabø 7, Katrin á Neystabø 2, Mildrið Jacobsen 1, Unn Kragesteen 1
**Brotskøst:** Kyndil 5, Neistin 3
**Útvísingar:** Kyndil 2, Neistin 2
**Dómarar:** Hallur Danielsen & Petur S. Dahl

Neistin vann samanlagt 49-38

# So vann H71 aftur

**Dysturin var mest sum týdningarleysur, men tað eydnaðist H71 at vinna á botnliðnum Neistanum**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Mikukvøldið spældu H71 og Neistin dyst í Atlantic Airways kappingini, og hóast dysturin ongan týdning hevði fyri hvørki topp ella botn, eftir at avgerðirnar í kappingini eru fallnar, so royndu liðini sítt besta.

H71, sum eitt langt skifti lá væl fyri í kappingini um at sleppa í finaluna um FM, dragnaði seinastu umførini, og eftir eitt venjaraskifti, ið ikki fekk vent gongdini í tøkum tíma, hevði H71 bert heiðurin at spæla fyri mikukvøldið. Støðan var tann saman hjá Neistanum, sum hevur ligið aftast í deildini allan vetur.

### Neistin menti seg

H71 og Neistin spældu ein tættan dyst, sum endaði við, at H71 vann við einum máli.

Munurin var væl størri í hálvleikinum, tí tá var H71 á odda 15-9. Teir ungu spælararnir á Neistaliðnum góvu tó ikki upp, og teir stríddu seg inn í dystin aftur seinna hálva tíman.

Serliga einir fýra minuttir mitt í seinna hálvleiki royndust væl, tí tá fór Neistin frá 17-22 og upp á 21-22.

Eftir hetta gjørdist dysturin tættur og spennandi, og ein góðan minutt fyri leiklok javnaði Neistin til 26-26.

Seinastu løtuna hevði Neistin tó munin og gjørdi tvey tøtt mál, og at H71 so fekk seinasta orðið í dystinum, kundi ikki taka sigurin frá H71.



*Neistin tók seg rættiliga inn á H71 í seinna hálvleiki, men hoyvíkingar høvdu munin seinastu løtuna*

**FAKTA**

H71-Neistin 28-27 (15-9)
**Málskjúttar**
**H71:** Tróndur Vatnhamar 6, Jakob Jónsson 6, Johnny Durhuus 4, Heini Bendtsen 4, Pól Kjartan Dam 3, Bjarni Sørensen 2, Niels Viggo Niclassen 2, Sigtór Andreassen 1
**Neistin:** Tróndur Kragesteen 8, Áki Mørk 5, Dann Torleifsson 4, Rani Slættanes 3, Karl H. Olsen 2, Birgir Poulsen 2, Roer Dalsgaard 2, Karl Rasmussen 1
**Brotskøst:** H71 5, Neistin 4
**Útvísingar:** H71 2, Neistin 2
**Dómarar:** Hartvig Joensen & Kári Hansen

## Todi aftur skaddur

Tá ið Start í dag spældi venjingardyst ímóti Rosenborg, var Todi Jónsson ikki millum spælarar á liðnum hjá Start. Orsøkin er, at hann toygdi ein vødd í baklærinum undir venjing í gjár.

–Todi skal binda frið í tríggjar ella fýra dagar, og hann kann ikki spæla ímóti Rosenborg, men hetta er ein lítil skaði, og eg rokni við, at hann spælir aftur, tá ið vit koma til Spania leygardagin, sigur Rune Magnussen, fysioterapeutur við blaðið Fedrelandsvennen. Start skal í eina tíð halda til á venjingarlegu í Cadiz. Hetta er fyrireiking til norsku lands-kappingina, sum byrjar í næsta mánaði.

## Andrew og teir sleppa ikki í gongd

Fleiri av dystunum í næstbestu donsku deildini, sum skuldi byrja um vikuskiftið, eru avlýstir. Orsøkin er frost í vøllunum.

Fremad Amager við Andrew av Fløtum á liðnum skuldi spæla ímóti Braband, men DBU hevur avlýst dystin vegna frost. Tí fer Fremad Amager ístaðin at spæla venjingardyst ímóti Skjold á einum graslíkisvølli.

## Byrial á eykaliðnum

Johan Byrial Hansen spældi í miðverjuni hjá eykaliðnum hjá AC Horsens, sum týskvøldið spældi venjingardyst ímóti Braband IF. Hesa uppgávuna røkti hann væl, tí einki mál kom ígjøgnum. Hinvegin eydnaðist heldur ikki AC Horsens at skora, og tí endaði lívligi venjingardysturin 0-0.

## Súni kann fáa kjansin

AaB hevur selt vinstra bakkin Allan K. Jepsen, og høgri bakkurin Allan Olesen hevur fingið ein skaða. Tí er møguleikin góður fyri, at føroyski landsliðsspælarin Súni Olsen kann fáa spælitíð í næsta dystinum hjá AaB. Súni hevur røkt skiftandi uppgávur á liðnum hjá AaB, og hann hevur millum annað spælt fleiri dystir sum avloysari fyri júst Allan Olesen, sum nú má binda frið í eina tíð.